## inni - trygt og ómaksleyst til hús



### Íbuð – undir Kongavarða H1 th Argir

Væl dámda íbúðin undir Kongavarða á 102 m$^2$ er til sølu. Bert hendan eina er eftir í hesari støddini. Íbúðin, sum er í gerð, er sera snøgg, væl gjørd og úr besta tilfari. Harafturat er felagsøki. Hon er væntandi liðug várið 2009. Har er trappurúm / lyfta, inngongd, gongd / forstova / garderoba, baðirúm / vaskirúm, køkur, borðstova / stova við útgongd til svala, hjúnarrúm við útgongd til svala og kamar. Íbúðin liggur í friðarligum, náttúruvøkrum og barnavinaligum umhvørvi við góðum tilplantaðum felagsøki, spæliplássi, sparkivølli og góðum parkeringsøki. Íbúðin er á 1. hædd í blokki H til høgru. Afturat keypskostnaðinum skal leggjast út kr. 150.000,00 fyri mvg, ið keyparin kann søkja um at fáa endurgoldið.

**Prísuppskot: 1.538.710,00 kr.**



### Sethús – Hóvabrekka 4, Argir

Húsini eru 2 hæddum. Niðara hædd er uml. 78 m$^2$ og ovara hædd er uml. 60 m$^2$ – í alt uml. 138 m2. Grundøki er 660 m$^2$. Byggiár: 1990, men ymiskar dagføringar eru gjørdar so sum nýggjur køkur, baðirúm, gongd, kamar, trappa, vindeygu í køki, garður, útigólv, brotflísar o.a. Í neðra er útigólv / terassa, inngongd, gongd, baðirúm, hjúnarrúm, matarkøkur, borðstova / stova við trappu upp til ovaru hædd og útgongd út í garðin. Í ovaru hædd er trappugongd, gongd, hugna- / sjónvarpsstova, wc og 2 kømur. Garður / urtagarður er runt húsini. Húsini standa í náttúruvøkrum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg og hava góðan sólargang og frálíkt útsýni. Stutt er til barnagarð, skúla, nýggja ringvegin og sera gott busssamband.

**Hóskandi boð ynskist.**



### Grundstykki – Grønalíð 25, Tórshavn

Grundstykkið, sum liggur heilt einastandi væl fyri í gangiavstandi frá býnum, er 528 m2 til víddar og er væl egnað til at byggja sethús á. Vegur er til stykkið, og tað er lætt at gera byggiklárt. Grundstykkið liggur í vøkrum, friðarligum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg út til friðað øki. Stutt er til skúlar, stovnar og handlar. Útsýnið er einastandandi gott yvir alla Havnina og út á fjørðin, og einki kemur upp fyri.

**Prísuppskot : 1.350.000,00 kr.**



### Sethús Reyðagøta 6, Tórshavn

Húsini eru í 2 hæddum á 120 fermetrar + loft har uml. 20 m2 eru innrættaðir. Samlað búvídd er 260 m2. Grundøkið er 503 m2. Byggiár: 1994. Húsini eru dagførd so við og við og eru í góðum standi. M.a. er hetta nýtt: Helvtin av vindeygunum, úthurðar, baðirúm og hvítvørður eins og kømurini eru gjørd av nýggjum og nýggj trappa niður í kjallaran Í erva er inngongd, durur, gongd, trappugongd, baðirúm, 4 kømur, køkur / alrúm / stova. Í erva er kamar og útiloft. Í kjallarinum er vaskirum / fýrrúm og stórt kjallarúm, ið væl kann innrættast til íbúð. Húsini standa í náttúruvøkrum, friðarligum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg. Stutt er til dagstovn og gott busssamband.

**Prísuppskot : 1.800.000,00**



### Grundstykki – Langanes, Glyvrar

Ognin er grundstykkið matr.nr. 35b sum liggur heilt einastandi væl á Langanesi á Glyvrum, er 632 m2 til víddar og er sera væl egnað til at byggja sethús á. vegur er til stykkið, og tað er lætt at gera byggiklárt. Grundstykkið liggur í nýggjari útstykking í vøkrum, friðarligum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg. Stutt er til skúlar, stovnar og handlar. Útsýnið er einastandandi gott yvir út á fjørðin.

**Verður selt um hóskandi boð fæst.**



### Sethús Landavegur 17, Tórshavn

Húsini eru í 3 hæddum – samlað búvídd 192 m2. Grundøkið er 317 m2. Byggiár: 1923 / 1962. Húsini er nakað dagførd og annars væl hildin. Í miðhæddini er hjallur, inngongd, gongd, køkur, borðsstova, stova, millumgongd við niðurgongd til kjallara, baðirúm og hjúnarrúm. Í ovastu hædd er trappupallur / arbeiðsrúm, wc, 1 størri kamar og 2 smærri kømur. Í niðastu hædd er inngongd, gongd, 1 størri kamar, 2 smærri kømar og vaskirúm / fýrrúm / kjallararúm. Húsini standa væl fyri í hugnaligum og friðarligum umhvørvi nær miðbýnum. Stutt er til barnagarðar, skúlar, stovnar, handlar og alt handa slag, ið liggur í mitt í býnum. Nakað av útsýni er úr ovastu hædd.

**Prísuppskot 1.800.000,00**



### Sethús – Garðagøta 3 Syðrugøta

Góð sethús í tveimum hæddum. Hvør hæddin er 120 fermetrar, íalt 240 fermetrar. Byggiár 1986. Grundøkið 566 fermetrar. Í ovaru hæddini er, gongd, køkur, bryggers/ vaskirúm, stova, baðirúm við baðikari, kamar, arbeiðsrúm og hjúnarúm við klædnarúmi og baðirúmi við brúsu. Í niðaru hæddini er, stova, køkur, 3 kømur, baðirúm við brúsu, gongd , fýrrúm og kjallararúm. Húsini standa sera væl fyri ovaliga í bygdini við blindan veg, har er sera gott útsýni, og spælipláss er beint uttanfyri køksvindeygað. Stórur urtagarður er rundan um húsini.

**Hóskandi boð ynskist.**



### Raðhús : Langatún 18/Bókbindaragøta 31

Húsini eru í 3 hæddum á 44 m2 – í alt 132 m2. Grundøkið er 107 m2. Byggiár: 1958. Klædningur, tak og vindeygu eru frá 1985, køkurin frá 1983, wc í neðra frá 2000, baðirúmið frá 1978 og ketil / brennari / pumpa frá 2002. Í miðhæddini er inngongd, gongd, wc, borðsstova / stova, køkur og trappugongd. Í ovastu hædd er tappupallur, hjúnarrúm, 2 kømur, baðirúm og wc/baðirúm. Í niðastu hædd er inngongd, gongd, kamar, kjallararúm og hjallur. Framman fyri húsini er garður / urtagarður. Húsini standa í veðurgóðum og friðarligum umhvørvi. Útsýnið er hampiligt frá ovastu hædd. Húsini standa nær miðbýnum og stutt er til skúlar, dagstovnar, handlar o.m.a.

**Prísuppskot 1.600.000,00**



### Sethús – Karlotsgøta 3, Hoyvík

Nýggj hús við garasju í kjallarinum, liðug bygd 2008 . Húsini eru eini sniðhús "Norðsetur". Húsini eru í tveimum hæddum við høgari reising, hvør hæddin er uml. 100 fermetrar + 60 fermetrar loft sum er klárt at innrætta. Samlað búvídd á uml. 260 fermetrar. Á miðhæddini er inngongd, gongd / trappa upp til loft og niður í kjallarin, gesta wc, millumgong, køkur, stova, 3 kømur, hjúnarrúm og baðirúm. Á kjallarahæddini er stórt kjallararúm og hurð inn til garasjuna. Húsini standa væl fyri í nýggjum, barnavinaligum umhvørvi, fá fet frá nýggja skúlanum og dagstovni, gott busssamband oman í býin.

**Prísuppskot: 2.5 milliónir kr.**



### Jørð : á nesi 17, Nes Vágur

Talan er um 3 ognin á Nesi í Vági: 1) Grundstykki á 1.494m2, ið kann býtast sundur í 2 við ástandandi sethúsum frá 1952 í 2 hæddum á 76m2 – í alt 152m2, 2) stór ikki vetrarfriðað trøð á 20.658m2 við ástandandi gomlum smiðjubygningi og 3) lítið jarðarstykki á 203m2 við ástandi fjósi / hoyggjhúsi. Ognirnar verða seldar saman ella hvør sær.

**Prísuppskot:**
**fyri 1) kr. 300.000,00 -**
**fyri 2) kr. 1.000.000,00 -**
**fyri 3) kr. 60.000,00.**



### Sethús – á Gøtuteigi 11, Leirvík

Góð sethús í tveimum hæddum. Grundstykki : Langanes Glyvrar. Hvør hæddin er 120 fermetrar, íalt 240 fermetrar. Byggiár 1989. Grundøkið 486 fermetrar. Í ovaru hæddini er, durur, gongd, køkur,stova, hjúnarúm við baðirúmi, 2 kømur og baðirúm. Í niðaru hæddini er fýrrúm/ kjallararúm. Húsini standa sera væl fyri í bygdini við blindan veg, har er sera gott útsýni. til húsini er eisini ein hjallur.

**Prísuppskot: 1.4 milliónir kr.**



### Grundstykki : í Geilini 20-22 Sørvágur

Talan er um eitt stórt grundstykki á 1.325 m2, ið er væl egnað til at byggja sethús, tvíhús ella raðhús á. Tað vil siga, at byggjast kunnu í minsta lagi 4 hús/búeindir. Stykkið verður selt í einum ella í tveimum. Stykkið, sum er grivið út og planerað, er klárt at byggja á. Vatn, frárensl, kloakk, el og telefon er beint við, og seljarin átekur sær at gera graviarbeiðið til rottanga. Stykkið liggur sera væl fyri í friðarligum og veðurgóðum umhvørvi út til veg og hevur sera gott útsýni.

**Prísuppskot: kr. 220.000,00 pr. stk.**



### Sethús Hornavegur 5, Hoyvík

Sera hugnalig sethús í 3 hæddum. Búøkið er 232 fermetrar. Grundøkið er 502 fermetrar. Til húsini er eisini ein nýggjur hjallur umleið 12 fermetrar til støddar. Byggiár: 1966. Húsini eru dagførd so við og við og eru í sera góðum standi. Í ovastu hædd er stórt útiloft, 2 kømur, goymslurúm, ið kann gerast til baðirúm, nógv innbygd skáp og goymslurúm eru undir væðingini. Í miðhæddini er gongd, vaskirúm við gólvhita, wc, brúsa, Unoform køkur, borðstova, stova og kamar. Í niðastu hæddini er sjálvstøðug íbúð á umleið 30 fermetrar. Har er gongd, baðirúm, køkur og stova / kamar. Eisini er stórt kjallarúm / fýrrúm. Húsini standa sera væl fyri í gomlu Hoyvíkini við blindan veg. Har er sera friðalig, barnavinarligt og veðurgott. Tú ert nær við nátturuna - sum á bygd og tó nær býnum. Hugnaligt øki er rundan um húsini. Nakað er plantað, sólkrókur er og parkeringsøki er til 4 bilar.

**Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.**



### Sethús Áargeil 5

Húsini eru 3 hæddum. Miðhæddin er 137,5 m2, niðasta hædd er 53 m2 og ovasta hædd er 15 m2 – í alt 205,5 m2. Grundøkið er 656 m2 (+ møguliga 342 m2). Byggiár: 1975, men húsini eru dagførd so við og við, so tey nú eru sum nýggj. M.a. eru nýggj vindeygu omaneftir, niðasta hædd innrættað, kømur í miðhædd dagførd, loftið lyft upp í hjúnarrúmi, trappa í stovuni, nýtt tak, ketil, oljufýr og nýggj loft allastaðni. Í miðhæddini er inngongd, durur / gongd, niðurgongd til niðastu hædd, gestawc, alrúm / borðsstova / matarkøkur við útgongd til útigólv, bryggers vi egnari inngongd, gongd, hjúnarrúm, baðirúm og kamar. Í ovastu hædd er útsýnisstova við panoramaútsýni oman yvir býin og út á fjørð. Í niðastu hædd er inngongd, stova / kamar, fýrrúm / kjallararúm. Garður / urtagarður er oman til ánna. Húsini standa í friðarligum og veðurgóðum umhvørvi nær býnum – 8 min. til gongu. Stutt er til barnagarðar, skúlar, ítróttarøki, Norðurlandahúsið o.m.a. Fleiri bussar koyra beint til hurðina.

**Prísuppskot : 2.200.000,00**

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni